LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 37/2022 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um rætt at fáa útskrivað føroyskt pass til føroyingar uttanlands

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Kann løgmaður staðfesta, at føroyingar búsitandi uttanlands eiga at kunna velja at fáa útskrivað føroyskt pass, og at tað finnast fordømi fyri tí?
2. Vil løgmaður tryggja, at øll, ið ynskja tað, kunnu velja tað føroyska passið, tá ið tey skulu hava útskrivað ella endurnýggjað pass, meðan tey eru búsitandi uttanlands?
3. Hvat er lógargrundarlagið fyri at nokta føroyingum uttanlands eitt føroyskt pass, og hvat er lógargrundarlagið fyri at útskriva donsk ES-pass til føroyingar í Føroyum?

Svar:

Til spurning 1-3
Sambært Lovbekendtgørelse nr. 1196 af 10. november 2017 for Færøerne af lov om pas til danske statsborgere m.v. og Bekendtgørelse nr. 994 af 11. oktober 2012 for Færøerne om pas m.v., er tað ríkismyndugleikarnir, ið útskrivað pass.

Løgmansskrivstovan sendi tískil tann 16. september spurningin til danska løgmálaráðið at svara. Orsakað einari misskiljing í danska løgmálaráðnum, hevur tað tíverri drigið út hjá Løgmansskrivstovuni at fáa svar uppá spurningin frá danska løgmálaráðnum. 14. oktober hevur danska løgmálaráðið svarað, at tey ikki fáa svara spurninginum, meðan val er útskrivað til Fólkatingið.

Heitt verður tískil á spyrjaran um at seta spurningin av nýggjum eftir fólkatingsvalið. Av tí spurningurin viðvíkur máli, sum hoyrir undir málsræði ríkisins, verður heitt á spyrjaran um at seta spurningin til Ríkisumboðsmannin, sbr. tingskipanin § 53 Stk. 5.

Í Tinganesi, 14. oktober 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo